# SERSTØK BYGGISAMTYKT MILLUM SKOTARÓK OG OYGGJARVEGIN

Ætlanin við hesi serstøku byggisamtyktini er, at skipa íbúðarbygging fyri økið millum Skotarók og Oyggjarvegin. Økið skal skipast sum ein heild, og byggjast skal við virðing fyri lendinum, soleiðis at útsýni og nøktandi ljósviðurskifti kunnu tryggjast til eitt fjølbroytt útboð av bústaðareindum.

Økið fevnir um matr. nr. 1233a, 1233b, 1378 og 1235a, Tórshavn, sí fylgiskjal 1.

Samlaða økið er umleið 10.840 m2 til støddar, og ætlanin er at byggja íbúðir á økjunum A (Umleið 5000m2) og B (umleið 3760 m2). Sí fylgiskjal 2.

Fylgiskjal 1 og Fylgiskjal 2 eru partur av hesi byggisamtykt.

## § 1. ENDAMÁL OG HEIMILD

Stk. 1. Endamálið við hesi serstøku byggisamtyktini, er at skipa bústaðarbygging á økinum, soleiðis at bygt verður báðu megin nýggja bústaðarvegin, sum víst í fylgiskjali 2.

Stk. 2. Økið liggur í umráðispartinum A1 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum er ætlað til bústaðir.

Stk. 3. Sambært kap. II, §5, stk 10 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er ásett fyri A1 øki, at: Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.

Stk. 4. Fyri viðurskifti, sum ikki eru reguleråð í hesi serstøku byggisamtykt, eru ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu galdandi.

## § 3. NÝTSLA ØKISINS

Stk. 1. Á økinum, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, kunnu byggjast íbúðir, felags hentleikar til íbúgvarnar og annars tað sum verður loyvt í almennu byggisamtyktini fyri umráðispartin A1.

## § 4. BYGGING, STØDD OG STAÐSETING

Stk. 1. Byggjast kunnu í mesta lagi 60 bústaðareindir

Stk. 2. Bygging er bert loyvd á øki A og øki B, sum sýnd í fylgiskjali 2.

Stk. 3. Mest loyvda byggistig er 0,3.

Stk. 4. Mest loyvda nýtslustig 0,7.

Stk. 5. Útrokning av byggi- og nýtslustigið skal vera samsvarandi kap. II, § 23 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Stk. 6. Fyri øki A skulu hús við vanligari mønureising ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna. Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, skal tann lægra síðan ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan ikki vera hægri enn 7,5 til hægsta punkt við útvegg.

Stk 7. Fyri øki B skulu hús við vanligari mønureising ikki vera hægri enn 9 m til hægsta punkt við útvegg og 12 m til mønuna. Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, skal tann lægra síðan ikki vera hægri enn 9 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan ikki vera hægri enn 10,5 til hægsta punkt við útvegg.

## § 5. VEGIR OG PARKERINGSPLÁSS

Stk. 1. Vegir og parkeringspláss skulu gerast sambært ásetingum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu og Fylgiskjal 2.

## § 6. ÚTSJÓND

Stk. 1. Øll bygging í økinum, sum byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggifultrúan.

Stk. 2. Kommunan skilar sær rætt at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við nýbygging, út- og umbygging.

## § 7. BYGGIMYNDUGLEIKI OG ÁTALURÆTTUR

Stk. 1. Byggimyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## § 8. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR

Stk. 1. Smávegis læ ttar frá reglunum í hesi byggisamtykt kann byggivaldið geva loyvi til, um so er, at dámurin á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.




**Tórshavnar Kommuna**
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 1233a, 1233b, 1378 og 1235a | | | | |
| **Undirheiti** | Fylgiskjal 1 | | | | |
| **Mát** | 1:1000 | | | | |
| **Dagur** | 26.03.2024 | **Journal** | 22/07222 | **Teknað** | RSB |




| Serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 1233a, 1233b, 1378 og 1235a | |
|---|---|
| Fylgiskjal 2 (uppskot) | Støðumynd / 1:2000 / A4 |
| TÓRSHAVNAR KOMMUNA Býarskipanardeildin - 26.03.2024 | |
| Mynd: 1 av 1 | Teknað: JL |